NÓSI

Nósavitjan

Nósi hevur føðingardag frá 17. til 21. september.
Nósi kemur í allar deildir hjá Føroya Banka at heilsa uppá børnini ið koma í føðingardag. Tømir tú tín Nósa, ja so fært tú eisini eina føðingardagsgávu.



Nósi vitjar á deildunum hesar dagar:

Norðoyggjar	Klaksvík	Týsdagin	18. sep. kl. 10.30 – 11.30
	Klaksvík	Týsdagin	18. sep. kl. 14.30 – 15.30
Eysturoy	Eiði	Mánadagin	17. sep. kl. 13.00 – 13.30
	Norðskáli	Mánadagin	17. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Leirvík	Mánadagin	17. sep. kl. 13.00 – 14.00
	Gøta	Mánadagin	17. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Fuglafjørður	Mikudagin	19. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Saltangará	Hósdagin	20. sep. kl. 10.30 – 11.30
	Toftir	Hósdagin	20. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Saltangará	Hósdagin	20. sep. kl. 16.30 – 17.30
	Strendur	Fríggjadagin	21. sep. kl. 13.00 – 14.00
	Skála	Fríggjadagin	21. sep. kl. 14.30 – 15.30
Vágar	Miðvágur	Hósdagin	20. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Sandavágur	Hósdagin	20. sep. kl. 16.00 – 17.00
	Sørvágur	Fríggjadagin	21. sep. kl. 13.00 – 14.00
Sandoy	Skopun	Fríggjadagin	21. sep. kl. 14.00 – 14.30
	Sandur	Fríggjadagin	21. sep. kl. 18.00 – 19.00
Suðuroy	Hvalba	Mánadagin	17. sep. kl. 11.00 – 11.45
	Vágur	Mánadagin	17. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Tvøroyri	Týsdagin	18. sep. kl. 14.30 – 15.30
Streymoy	Kollafjørður	Týsdagin	18. sep. kl. 14.30 – 15.30
	Vestmanna	Mikudagin	19. sep. kl. 14.00 – 15.00
	N.Finsensgøta	Hósdagin	20. sep. kl. 10.30 – 11.30
	Hornabær	Hósdagin	20. sep. kl. 13.00 – 14.00
	SMS	Hósdagin	20. sep. kl. 14.30 – 15.30
	N.Finsensgøta	Hósdagin	20. sep. kl. 16.30 – 17.30

Í summar hevur tað verið neyðugt at broyta ferðaætlanina hjá Smyrli hósdagar og tað er komið tvørt fyri hjá mongum. Men nú er liðugt við tí og Strandferðslan ætlar ikki, at hetta skal vera gongdin aftur næsta ár

Liðugt at broyta siglingina hósdag

Hereftir fer Smyril at sigla eftir vanligu ferðaætlanini hósdagar

SUÐUROYARSIGLINGIN
Áki Bertholdsen

Tey, sum sigla við Smyrli, hava hesa seinastu tíðina ilskast inn á Strandferðsluna, tí at hon so ofta hevur broytt ferðaætlanina hósdagar.

Eftir ferðaætlanini, skal Smyril sigla av Havnini, suður á Tvøroyri klokkan 14 hósdag og norður aftur av Tvøroyri klokkan 19.

Hósdagar er ferðaætlanin hjá Smyrli løgd eftir fiskivinnuni í Suðuroynni. Tvs, at ferðaætlanin er løgd soleiðis, at tað skal bera til at arbeiða á flakavirkjunum í Suðuroy so leingi sum gjørligt hósdag og kortini fáa fiskin av landinum longu hóskvøld, sum er neyðugt fyri at fáa hann á marknaðin til tíðina.

Men hesar seinastu vikurnar er tað ferð eftir ferð komið fyri, at Smyril ístaðin hevur siglt suður á miðdegi og norður aftur longu klokkan 17.

Og hendan broytingin er eisini gjørd fyri at ganga fiskivinnuni á møti.

Í summar, ímeðan Norrøna hevur verið í summarsigling, hevur tað nevniliga verið Clare, sum hevur ført fiskin av landinum.

Men Clare siglur so seint, at tað hevur verið neyðugt at framskunda fráferðina úr Føroyum, fyri at fáa fiskin fram til tíðina og tí hevur tað eisini verið neyðugt at framskunda fráferðina av Tvøroyri hóskvøld tveir tímar, til kl. 17.

Tað skerst tó ikki burtur, at hendan broytingin er komin illa við hjá fiskavirkjunum í Suðuroy, tí nú hava tey verið noydd til at gevast at virka tveir tímar fyrr hósdagar.

Men tað skerst heldur ikki burtur, at hetta hevur elvt til ónøgd hjá ferðafólki, tí tey eru fleiri, sum hava verið ov sein til Smyril, tí tey ikki hava fingið við, at ferðaætlanin er broytt.

Liðugt nú

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni er harmur um, at tað hevur verið neyðugt at broyta ferðaætlanina so ofta hósdádagar.

– Men tað hevur verið neyðugt, fyri at fáa fiskin av landinum til tíðina, sigur hann.

Hann vísir tó á, at nú er tað liðugt við broytingunum á hesum sinni.

–Nú er summarsiglingin hjá Smyril Line hildin uppat, so nú er tað aftur Norrøna, sum skal føra fiskin av landinum.

Tí verður tað heldur ikki longur neyðugt at framskunda fráferðina av Tvøroyri hósdagar.

Reidar Nónfjall sigur, at teir fara avgjørt at hava hetta í huganum til næsta ár so at teir fáa byrgt upp fyri, at tað ikki aftur skal vera neyðugt at broyta ferðaætlanina hvønn hósdag.

Hann sigur, at Strandferðslan fer nú at taka málið upp við Smyril Line fyri at vita, hvussu verður næsta ár.

Men kanska endar tað við, at Smyril heilt einfalt fer at broyta ferðaætlanina, so at allir túrarnir seinnapartin hósdagar verða framskundaðir tveir tímar, ella so.

Í øllum førum vil Strandferðslan sleppa undan at broyta ferðaætlanina í heilum.

Skálafjarðarsiglingin verður nú bjóðað út

Skálafjarðarsiglingin skal nú á privatar hendur. Næsta ár verður eisini rutusiglingin til Mykinesar privatiserað

SAMFERÐSLA
Áki Bertholdsen

Ternan hevur siglt upp á Skálafjørðin fyri Stranmdferðsluna, men 1. januar skal skal skálafjarðarsiglingin á privatar hendur

Í dag verður byrjar eitt nýtt tíðarskeið í søguni hjá Strandferðsluni. Tí í dag verður á fyrsta sinni ein sjóvegis farleið hjá Strandferðsluni boðin út til privat at reka víðari.

Talan er um siglingina ímillum Havnina, Strendur og Skálafjørðin, sum nú fer á privatar hendur.

Aðrastaðni í Sosialinum í dag, lýsir Strandferðslan við, at skálafjarðarsiglingin verður boðin út.

Freistin fyri at lata inn tilboð er ásett til 29. oktober 2001.

Ætlanin er, at halda fram at bjóða rutusigling hjá Strandferðsluni út næsta ár, tá ið siglingin út í Mykinesar verður boðin út.

Strandferðslan sigur, at tað er eftir krøvum frá politiska myndugleikanum, at hon nú hevur fyrireikað, at Skálafjarðarleiðin og Mykinarleiðin nú verða bjóðaðar út.

Men tað er eisini greitt, at at útbjóðingin skal føra fíggjarligar og tænastuligar fyrimunir við sær fyri landið.

Tey, sum eru áhugað at bjóða upp á siglingina, kunnu venda sær til Strandferðsluna, so fáa tey treytir.

Eitt nú sigur Strandferðslan, at hon vil samstarva um flutning uttanfyri vanligu ferðaætlanina á Skálafjarðarleiðini, m.a. um serflutning av ymiskum slagi.

Ætlanin er, at Skálafjarðasiglingin skal á privatar hendur longu frá 1. januar

Men Strandferðslan tilskilar sær rætt til at velja ímillum innkomin tilboð, ella til ikki at taka við nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp.

Formaðurin í danska autistafelagnum til Føroya

TÍÐINDASKRIV

Í næstu viku kemur formaðurin í danska autistafelagnum, Jørgen Lindgren, til Føroya. Hann skal halda fyrilestur um autismu sum heild og um menningina innan autismuna í Danmark. Eisini fer hann at siga frá, hvat foreldur og avvarðandi í Danmark kunnu gera, tá ið tey hava fingið diagnosuna hjá barninum. Hvørji tilboð eru og hvussu verður í framtíðini

Danmark hevur verið rættiliga frammalaga í viðgerðini av autistiskum børnum, og kendasti skúlin í Norðurlondum man vera Sofieskúlin í Keypmannahavn. Í 1962 tóku foreldur at autistiskum børnum seg saman og stovnaðu felagið »Psykotiske Børns Vel«, seinni »Foreningen for Autisme«. Hetta felagið er rættiliga stórt í dag, og arbeiðið, ið felagið hevur gjørt fyri autistisk børn og foreldrum teirra, er ikki smávegis. Fyri 10 árum síðani var føroyska autistafelagið sett á stovn, og er tað ein deild av tí danska. Fríggjadagin 21.9. og leygardagin 22.9. fer formaðurin í danska felagnum, Jørgen Lindgren, at halda fyrilestur í veitsluhøll landssjúkrahúsins um autismu og hvussu viðurskiftini hjá fólki við autismu eru í Danmørk.

Hvat er autisma?

Vit kenna øll orðið »automatisk«. Okkurt, sum verður sett í gongd ella virkar av sær sjálvum. Hesi børn gera sumt umaftur og umaftur, uttan at hetta gevur teimum nakra meining. Nógvir autistar tosa als ikki, og tey sum tosa hava hetta sonevnda »ekkomálið«. Mest sum alt verður tikið bókstaviliga. Ein mamma, sum átti eina autistiska gentu, tók ímóti einari yngri dóttir, sum hevði verið fyri onkrum óhappi, og hon segði við gentuna: »Tú sært út, sum hevur tú grátið eyguni úr tær«. Autistiska gentan, sum hoyrdi hetta øtaðist og fór beinan vegin at leita á gólvinum.

Tað, sum eyðkennir autistiska barnið, eru tær einstáttaðu rørslurnar. Barnið svevur ofta illa og kann í fleiri tímar sita og rugga aftur og fram frá høvdalag til fótalag. Eisini fær barnið grátiherðindi, og foreldrini gerast illa strongd. Eitt tað ringasta hjá foreldrunum er, at tey einki veruligt samband fáa við barnið.

Nýggjar biologiskar kanningar

Fleiri kanningar hava verið seinastu árini. Vit vita nú, at autisma er ikki vanlig sinnissjúka, men er heldur eitt álvarsligt menningarbrek, sum kann stava frá biologiskum avvikum í heilanum. Ein kanning, sum varð gjørd í 1979 vísti, at 48% av møðrunum kendu seg sjúkar og høvdu trupulleikar í burðartíðini, 37% høvdu trupulleikar undir føðing, og 9% søgdu, at barnið var stútt sjúkt ta fyrstu tíðina eftir føðing.

Fleiri aðrir patalogiskir ella medisinskir tilstandir eru eisini knýttir at autismu. Eitt nú hitt so kenda fragila X-syndromið – tað skroypiliga X kromosomið.

Foreldrini varnast brekið

Um foreldrini og heimalæknin hava mistanka um brekið, skal barnið sum skjótast fara til barnapsykiatriska kanning. Verður tað staðfest, at barnið hevur autismu, skal farast í gongd sum skjótast við serligari undirvísing, bæði í barnagarði og seinni í skúla. Tað eru serlærarar til hesi børn.

Jøren Lindgren kemur at siga frá

Formaðurin í danska autisafelagnum, Jørgen Lindgren, kemur til Føroya at siga frá um autismu. Hann eigur sjálvur ein autistiskan drong og kennir trupulleikan at egnum barmi. Hann fer at siga frá gongdini innan autismuna í Danmark og hvørjar møguleikar har eru til hjálp og viðgerð. Fyrilestrarnir verða 21.9. og 22.9. í veitsluhøll landssjúkrahúsins. Byrjað verður bæði kvøldini kl. 19.00.

Føroyar skulu aftur í eldin á Balkan í ársins síðsta landsdysti. Seinast Slovenia og Føroyar hittust í Føroyum endaði javnt. Stuðli okkara monnum á ferðini móti enn einum bragdi í HM-undankappingini, sum hevur roynst tann frægasta higartil.

Flogið verður úr Vágum mikudagin 3/10 kl. 17:30 og heimaftur aftaná dystin seint leygarkvøldi tann 6/10.

Gist verður á 5* hotellinum Holiday Inn Ljubljana Hotel, sum liggur í miðbýnum í Ljubljana. Skipað verður fyri 2 útferðum og flutningi í Ljubljana.

Prísur: kr 6.460,-

Íroknað prísin er: Flogferð, innivist í dupultkameri v/morgunmati í 3 nætur, 2 útferðir (annur við mati), atgongumerki til dystin, flutningur frá flogvøllinum í Ljubljana til hotellið, til dystin og aftur á flogvøllin. Øll ferðaavgjøldini.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo